**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Frítíðaravloysarar fyri portørar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum fyri sjúkrahúsarbeiðarar (portørar) frá 13. juni til 30. august 2002.

Umframt koyring av sjúkrabili umfatar starvið alt fyrifallandi inni- og útiarbeiði. Tilkallivakt heimífrá.

Tað er ein fyrimunur at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og upplýsingum um starvsroyndir skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
Postboks 51
800 Tvøroyri

innan 15. mars 2002.

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Sjúkrasystrafelag Føroya verður leygardagin 9. mars 2002 kl. $10^{00}$ á Hotel Føroyum. Morgundrekka fæst frá kl. $9^{30}$ – $10^{00}$.

**Dagskrá:**
1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum ásetan av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum grannskoðarum
9. Ymiskt

**Sjúkrasystrafelag Føroya**

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður mikukvøldið 13. mars 2002 kl. 1930.

Skrá sambart lógum felagsins.

Fundarstaðið verður kunngjørt seinni.

**Nevndin**

# Maskinmeistari

**søkist til Elfelagið SEV**

**Starvið:**
Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum er leyst at søkja.

Við tað at Sundsverkið er í rakstri alt samdøgrið alt árið krevur starvið, at viðkomandi er til reiðar bæði at átaka sær alt vanligt dagligt viðlíkahaldsarbeiði í samstarvi við manningina á Sundsverkinum annars, og eisini at luttaka sum hjálparmaður (2. maður) á vakt uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Førleikakrøv:**
Tað er ikki eitt krav, at viðkomandi hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, men kundu vit hugsað okkum, at umsøkjararnir hava í minsta lagi tvey ára maskinmeistaraskúlaprógv ella javnbjóðis førleika. Royndir innan maskinmeistarayrkið eins og full maskinmeistaraútbúgving geva umsøkjarum fyrimunir.

**Lønin:**
Lønin verður sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið í 3. ella 4. lønarflokki, alt eftir útbúgving. Starvsaldursstigið í viðkomandi lønarflokki verður ásett eftir starvsaldri sum maskinmeistari síðani lokið prógv.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen ella John P. Danielsen á skrivstovu okkara í Havn, telefon 311366.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi hósdagin, tann 28. februar 2002.

Tórshavn, tann 21. februar 2002.

**Elfelagið SEV**

# Frá S&K-felagnum

**Avloysari til skrivstovustarv**

S&K-felagið søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk, ið skal í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiði umfatar í høvuðsheitum at upplýsa limum felagsins um rættindi og skyldur sambært sáttmálanum og viðkomandi lógum.

Tann, ið settur verður kemur at byrja um 1. mars 2002 og er arbeiðstíðin 20 tímar um vikuna, fyrrapartar.

Løn sambært S&K-sáttmálanum.

**S&K-felagið**
tlf. 316837 · fax. 310451
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

# *Búmerkjakapping*

Nú LISA, Listafólkasamband Føroya, verður 20 ár, er avgjørt at skipa fyri búmerkjakapping.

LISA er samskipandi felagsskapurin fyri føroysk listafólk og fyri tær ymisku listagreinirnar so sum sjónleik, tónleik, myndlist og skaldskap. Búmerkið skal tí á einfaldan hátt ímynda tað, sum eyðkennir skapandi listina og/ella felags - skapin listanna millum.

Búmerkið skal kunna nýtast í svart/hvítum prenti. Navni "LISA" og "Council of Faroese Artists" skal kunna setast afturat búmerkinum. Dømi um samanseting av búmerki og navni eru tí vælkomin men eingin beinleiðis treyt.

Uppskotið til búmerki kann vera í støðd A4 ella A5, men skal kunna minkast, so tað er hóskiligt at nýta á brævpappíri, á heimasíðu, í teldu og øðrum tílíkum samskifti.

Uppskotið skal bera frámerki, sum skal ganga aftur í afturlatnum brævbjálva saman við navni á innsendara.

Dómsnevnd tekur støðu til innkomnu uppskotini. Í dómsnevndini eru tvey listafólk umframt starvsnevndin.

Ein virðisløn, kr. 15.000, verður latin fyri besta uppskotið. Metir dómsnevndin, at einki hóskandi uppskot er innkomið, skilar hon sær rætt til ikki at lata virðisløn.

Uppskotini skulu verða starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2002.

Listafólkasamband Føroya
Dj. í Geilsgøta 1
Postrúm 324
FO-110 Tórshavn

# Frá Maskinmeistarafelagnum

Ársaðalfundurin verður á Hotel Hafnia leygardagin 16. mars kl. $14^{00}$.

Uppskot frá limum at seta fram á aðalfundinum skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 2. mars.

**Nevndin**








# Kunngerð

**um bussrutu**
**Kambsdal-Fuglafjørður**

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at Fuglafjarðar býráð á fundi tann 22. januar 2002 hevur samtykt at fara undir fasta busskoyring við ferðafólki millum Kambsdal og Fuglafjørð.

Frá 01. mars 2002 verður koyrt vanligar gerandisdagar mánadfag.fríggjadagar hesar tíðir

| Av Kambsdali: | Úr Fuglafirði: |
|---|---|
| Kl. 07.40 | 08.10 |
| - 09.30 | 10.40 |
| - 12.00 | 12.30 |
| - 14.00 | 14.30 |
| - 14.50 | 15.25 |
| - 15.40 | 16.00 |
| - 16.30 | 17.45 |
| - 18.30 | 18.45 |
| - 19.30 | 20.30 |

Bussurin støðgar í Fuglafirði omanfyri skúlan, við Keypssamtøkuna og við skýlið við Føroya banka og við handilin hjá Haraldsen. Á Kambsdali verður støðgað við húsini hjá Petur Martin Hansen, við bussskýlið og við miðnámsskúlarnar.

Einvegiskostnaðurin fyri vaksin verður kr. 10,00 og fyri børn kr. 5,00. Næmingar, sum skulu hava flutning til og frá skúlunum í kommununi koyra ókeypis.

Fuglafjørður, tann 22. januar 2002

**Fuglafjarðar býráð**




**NORÐURLENDSKT SAMSTARVSPROJEKT**

**Á LEIKHÚSINUM GRÍMU**

Leygardagin 23.02 kl. 18.00
Sunnudagin 24.02 kl. 18.00
Mánadagin 25.02 kl. 20.00
Týsdagin 26.02 kl. 20.00
Mikudagin 27.02 kl. 20.00

Atgongumerkir á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning

**Nú bert 5 sýningar afturat!**

# Arbeiði

Søkt verður eftir lastbilaførarum at koyra dumpara í samband við tunnilin undir Vestmannasund at byrja 1. mars 2002.

**P/F I. R. Lastvognar**
FO-410 Kollafjørður
tlf. 421123

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo